


## Læruætlan fyri ungdómin hjá KÍ út í bók

Endamálssetningurin fyri ungdómsdeildirnar hjá KÍ í samband við Visión 2009 er "Flest og best", og tað er í tráð við hendan málsetning, at Pætur Clementsen, undómsvenjari, saman við einum arbeiðsbólki hevur endurskoða og dagført Bláubók, sum er ein læruætlan fyri ungdómin hjá KÍ.
- Tilfarið er ætlað sum ein vegleiðing til okkara venjarar, so at góða arbeiðið, sum fer fram hvønn dag, fær eina javna góðsku. Í hesum er tað av stórum týdningi at venjarar, og øll í felagnum sum heild, eru tilvitað um hvørjum felagið arbeiðir fram ímóti, so at vit øll draga somu línu, sigur Pætur Clementsen við heimasíðuna hjá KÍ, og hann leggur aftrat, at vónandi kann dagførda Bláabók geva íblástur til hetta arbeiði.
Bláabók verður handað venjarunum á almennari móttøku í KÍ høllini tann 15. apríl.

# Óførir unglingar í Hoyvík

**Í Hoyvík eru tey errin av ungdóminum, sum hevur tryggjað felagnum trý heiðursmerki. Dreingir 17 ár gjørdust greipuvinnarar, tá gjørdust føroyameistarar og steypavinnarar, og í Dreingir 14 ár vunnu tey eisini FM**



*H71 gjørdist greipuvinnarar í Dreingir 17 ár*

***Standandi frá vinstru:*** *Jákup S. Simonsen, venjari, Áki Herálvsson, Tróndur H. Møhr, Einar N. Andreassen, Ámund Nolsøe, Rúni V. Højgaard, Rógvi Sørensen, Niels Christiansen, Hans Kári Hansen, Dánjal Tórgarð, liðformaður*

***Húkandi frá vinstru:*** *Arnbjørn Mortensen, Kári Joensen, Brandur Nolsøe, Jóhan Hofgaard, Hanus Kristianssen og Kristian V. Jacobsen*
*Fremst á myndini liggur Tormóður Petursson, sum var maskottur. Á myndini vanta Bartal Henriksen og Hanus Norðberg*



*Føroyameistararnir í Dreingir 14 vóru eisini H71*

***Standandi frá vinstru:*** *Petur Even Djurhuus, venjarin, Andrass Vágsheyg, Hanus Norðberg, Dávur Simonsen, Sigmund Nolsøe, Jákup Joensen, Regin Slættanes, Gilli Petersen og Høgni Djurhuus.*

***Húkandi frá vinstru:*** *Janus Isaksen, Bogi Davidsen, Sigmundur Dahl og Tórur Sjúrðarson.*
*Fremst á myndini liggur Tormóður Petursson Djurhuus, sum var maskottur.*
*Fremst á myndini liggur Tormóður Petursson Djurhuus, sum var maskottur.*



## Raskir stranda-dreingir

**Dreingir 10 hava havt eitt gott kappingarár fyri STÍF. Teir hava bæði vunnið føroyameistaraheitið og steypakappingina í yngstu deildini.**

***Standandi frá vinstru:*** *Sigmundur í Garði, Jóhannus Olsen, Rani Funn, Kristian Martin Jacobsen, Sølvi Høgnesen, Kjartan Johansen, Marian Cirloganesco venjari.*

***Húkandi frá vinstru:*** *Einar Eivindson Toftegaard, Jan Ingason Hansen, Eliesar Joensen Høj, Poul Enok Hansen, Eybjørn Eiriksson, Pætur Johansen*
*Á myndini vantar Jack Nielsen*